# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Endaligt álit um stjórnarskipan

Mánadagin varð endaliga álitið frá Stjórnarskipanarnevndini handað løgmanni í Tinganesi. Greitt er, at tað liggjar nógvir arbeiðstímar og eitt sera stórt arbeiði undir hesum álitinum. Mangt áhugavert er í álitinum, sum givið fer at fáa nógva umrøðu í bæði fjølmiðlunum og í tí politisku skipanini annars. Vit á blaðnum vilja í hvussu gera okkara til, at álitið fær ta umrøðu tað eigur og annars at leggja upp til eitt breitt alment orðaskifti um teir mongu so týðandi spurningarnar, sum nomið verður við í álitinum, sum viðvíkja okkara framtíð sum tjóð.

Álitið um nýggju stjórnarskipanina er sera áhugavert, og tað er týdningarmikið, at eitt so týðandi stig sum nýggj stjórnarskipan verður viðgjørt seriøst og krittiskt. Í sjónvarpinum í gjár sá tað tó út til, at kjakið druknaði í partapolitikki. Tað vil so altíð gerast partur av orðaskiftinum, hinvegin er hetta málið so stórt og so grundleggjandi fyri okkum øll, at tað er at vóna, at allir flokkar lyfta seg upp um tað oftani lítið gevandi flokspolitiska keglið.

Vert er eisini at leggja til merkis alt fyri eitt, at tað í Jólaálitinum eru nakrar minnilutaviðmerkingar, sum eru krittiskar móti ymiskum punktum. Ein av greinunum, sum heilt givið fer at fáa nógva umrøðu, og sum m.a. Jóannes Eidesgaard, løgmaður hevur funnist at, er, har tað verður skotið upp, at løgmansembætið kann umskipast við tinglóg.

Hetta er sera óheppið fyri lógararbeiðið sigur løgmaður við Sosialin í gjár. Hann vísir á, tað, sum verður skrivað løgmansembætið, at tað kann umskipast við tinglóg. Tað ber ikki til, tí hetta er í andsøgn við grundarlagið fyri stjórnarskipanarsmíðinum, tí hugsanin er, at grundleggjandi broytingar krevja broytingar í stjórnarskipanini. Tað er sera løgið, og í stríð við andan í teirri nýggju skipanini, at staðfestingarrætturin hjá løgmanni kann flytast til tingformannin við tinglóg. Staðfestingarrætturin er ein so týdningarmikil og grundleggjandi heimild hjá útinnandi valdinum, at tað er ikki rætt at taka hesa heimild frá løgmanni, og kann tað, sambært uppskotinum, fremjast við broyting í tinglóg (sí § 59, stk. 3). Staðfestingarrættin skal løgmaður hava, og skulu broytingar fara fram hesum viðvíkjandi, skal henda grundleggjandi broytingin fremjast við broyting av stjórnarskipanini sigur løgmaður í viðmerkingini.

Vit síggja tí longu nú, at her er talan um ein rættiliga principiellan spurning um valdsbýtið millum løgting og landsstýri, sum Bárður Nielsen eisini vísir á. Høgni Hoydal sigur í minnilutaviðmerking seg vera heitan fyri einum møguligum forsetaembæti, men ávarar ímóti, at løgmaður skal hava heimild til at seta landið í undantaksstøðu.

Kaj Leo Johannesen vil hava stjórnarskipanina at vera undir donsku grundlógini og heimastýrislógini. Men í uppskotinum stendur, at „henda stjórnarskipan er fram um lógir."

Ein minniluti í serfrøðingabólkinum við m.a. Jóannesi Hansen, samfelagsfrøðingi, mælir m.a. til, at tingið skal góðkenna uppskot til landsstýrismenn. Bólkurin mælir eisini frá, at løgmaður skal staðfesta lógir, tá hann einki løggávuvald hevur. Her nógv at tríva í, og tað fara eisini vit at gera komandi tíðina.

**Sosialurin**

## Vrøvlting ella Løgting?

SONNI JACOBSEN



**Fyri nakað síðan samtykti Løgtingið at útlendsk samtøk ella einstaklingar ikki skulu eiga meirilutan í fyritøkum í føroysku fiskivinnuni. Nú skuldi ein trú at alt var so sára væl. Tá Løgtingið hevur samtykt eina lóg so sleppur væl eingin væl frá at bróta lógina? Hetta skuldi verið greitt. Og eitt ting, sum hevur virðing fyri sær sjálvum og sum ynskir, at onnur hava virðing fyri tí, skipar væl saktans skipa fyri at so er!**

Nú hendi so tað, sum vit øll vita, at onkur er so "formastiligur" at hann brýtur hesa lógina! "Big time" enntá. Og vit áttu at hildið okkum um høvdið og sagt: Nú verður heilt galið. Hatta fær álvarsligar avleiðingar. Nú rulla høvd – nú verða fiskirættindi inndrigin aftur – nógvir pengar mistir – stór skandala. – Men gakk. Helst er tað gamla søgan, at har vóru ov nógvir pengar uppi í, ov stór makt og politisk ávirkan var galdandi. Vina- og kenningapolitikkur eisini, væl saktans.

Tað var ein nevnd hjá Løgtinginum, sum avdúkaði at her var okkurt spinnandi galið. Vit høvdu altso frá hægsta stað fingið staðfest at lógin var brotin! Restin skuldi so bara verið procedura, ella vanligur arbeiðsháttur: Tann seki verður funnin og verður "behørliga" straffaður. Her er tað at øll vanlig procedura heldur upp og vrøvlið kemur inn. Málið verður lagt fyri tingið. Løgtingið fær at vita frá einum av sínum egnu nevndum at ein av teirra egnu lógum er brotin. So verður farið fram so sum lógin skrivar? Eg meini løgtingið eigur væl ikki at gera mannamun? "Eingin" eigur at sleppa væl frá at bróta løgtingsins lógir? – ella hvat? Kortini hendir tað fantastiska, at bara ein tinglimur heldur, at soleiðis eigur at vera. Onkur sigur at hesin tinglimurin hevur fingið missálit á seg sjálvan. Eg haldi ikki tað vera logiskan hugsanarhátt. Hesin tinglimurin er tann einasti, sum IKKI hevur fingið missálit. Tað hava tvørtur ímóti ALLIR hinir. Í hesum málinum hava vit tíverri 31 vrøvlhøvd á tingi og eitt skilafólk. Tað er mín niðurstøða.

Nú eri eg ikki løgfrøðingur, men mær vitandi er tað nakað sum eitur fyridømi innanfyri rættarskipanina. Hereftir vildi eg hildið, at ein og hvør frítt kann bróta løgtingsins lógir vísandi til áðurnevnda fyridømi? Løgtingið hevur jú sjálvt sagt, at tað er í lagi at bróta lógina! Tað skal onga avleiðing hava (bara nóg nógvir pengar eru innblandaðir – væl saktans – og kennskapurin er í lagið)? Eg meini – hvat skal fiskimálaráðharrin gera við tann næsta, sum selur skip og føroysk fiskirættindi til útlendskan kapital? Er tað lógina hann skal umsita eftir? Ella eru tað onnur fyrilit? Vit onnur standa spyrjandi...

Nei – Kári Højgaard hevur ikki fingið missálit á seg í hesum málinum. Tað hava hini 31 – givið sær sjálvum!

"Med lov skal land byggest", verður sagt. Hvussu skal ein byggja land, tá tingið sjálvt heldur, at tað er í lagið at bróta lógina? Tað verður stuttligt at síggja hvussu tey greiða seg úr hesi fløkjuni (tey enn einaferð) hava vavt seg inni í. Eg kundi dulnevnt meg "Spurin", men eg seti av prinsippi altíð mítt navn undir. Eg ynski løgtingslimum góðan bata og góð jól.

## Mín málsetningur

DAN R. PETERSEN



Tann seinasta mánaðin havi eg regluliga við greinastubbum og í kringvarpi viðgjørt evnir, ið avgjørt treingja til at strammast upp.

Evnini eru hesi:

**Sáttmálin skal haldast**
**Munandi hægri pensjón**
**Avrokning til tíðina**
**Betri arbeiðsumhvørvi**
**Betri tryggingarviðurskiftir**
**Stabilar sáttmálar**
**Útgjald frá Als.**
**Betri tænastu frá F. F.**
**Eitt viðkomandi F. F.-blað**

Valið skuldi verið einfalt. Eg fari tí at biðja allar sjómenn krossa seðilin, meðan hann enn liggur á køksborðinum, og fáa hann í postkassan, áðrenn hann verður gloymdur.

Nýggj tíð skal koma.




**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.